STUDNI
Student Grant Fund

# Vegleiðing til lestrarstuðulin skúlaárið 2024/2025

**Minst til at søkja umvegis Vangan. Við hesum verður málsviðgerin stytt og studningurin verður skjótari á kontu.**

## 1. Umsitingin av lestrarstuðlinum

Studni varð settur á stovn, tá ið føroyingar í 1988 yvirtóku fyrisitingina av SU.

## 2. Formliga grundarlagið

Stuðulin verður formliga umsitin sambært:

- Løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 165 frá 20. desember 2017.
- Kunngerð nr. 107 frá 25. august 2011 um lestrarstuðul, sum seinast broytt við kunngerð nr. 107 frá 16. juli 2019.

## 3. Stuðulshættir og -upphæddir

### *3.1 Tey, ið eru 18 ár og eldri*

Tey, ið eru 18 ár ella eldri, fáa vanliga lestrarstuðulin, um tey uppfylla treytirnar (sí punkt 4).

**Yvirlit yvir upphæddir**

| | Stuðul um mánaðin | Stuðul um árið í 11 mðr. |
|---|---|---|
| Studningur til hægri og styttri vinnu-førleikagevandi útbúgvingar | **4.960,-** | **59.520,-** (12mðr.) |
| Lægri studningur á miðnámi | **2.113,-** | **23.243,-** |
| Hægri studningur á miðnámi | **4.387,-** | **48.257,-** |
| Lán til hægri og styttri vinnu-førleikagevandi útbúgvingar | **2.782,-** | **33.384,-** (12 mðr.) |
| Lán á miðnámi | **2.782,-** | **30.602,-** |
| Endalán | **7.742,-** | **85.162,-** |
| Bókastudningur | **4.186,-** | |
| Vistarhaldsstudningur | **2.925,-** | |
| Barnastudningur | **1.150,-** | |
| Studningur til einsamallar uppihaldarar | **1.762,-** | |
| Barnsburðarfarloyvis studningur, hægri lestur | **4.960,-** | |
| Barnsburðarfarloyvis studningur, miðnám | **4.387,-** | |

*Studningurin frá Studna er ikki skattskyldugur. Stuðulsárið er 11 mánaðir. Tó verður stuðul veittur teimum, ið lesa hægri lestur, styttri vinnuførleikagevandi útbúgvingar og støkum uppihaldarum í 12 mánaðir.*

Tey, ið verða 18 ár í stuðulsárinum, fáa stuðulin mánaðin eftir, at tey eru fylt 18 ár. Hetta er sjálvsagt treytað av, at Studni hevur fingið umsóknina. Tá hava hesi eisini møguleika at søkja um lán.

### *3.2 Tey, ið eru undir 18 ár*

Tey, ið eru undir 18 ár, fáa bókastudning. Harafturat er møguleiki hjá nøkrum av teimum lesandi undir 18 ár at fáa vistarhaldsstudning.

**Bókastudningurin**

Bókastudningur verður latin lesandi, ið eru undir 18 ár við byrjan av stuðulsárinum. Um lesandi, ið hava fingið bókastudning, fylla 18 ár í stuðulsárinum, fæst mánaðarligur studningur sjálvvirkandi mánaðin eftir, at tann lesandi verður 18 ár. **Tað er tískil ikki neyðugt at søkja um studning.**

**Vistarhaldsstudningurin**

Vistarhaldsstudningurin verður latin lesandi undir 18 ár, sum noyðast at flyta til útbúgvingarstaðið. Treytin fyri at fáa henda studning er, at sjóvegis farleið er millum heimabústað og skúlan, ella at vegalongdin millum heimstaðarbýin/bygdina og skúlabýin/bygdina er longri enn 35 km sambært almennu ásetingunum hjá Landsverki.

Fyri at fáa vistarhaldsstudningin skal Studna-leiguváttanin útfyllast og undirskrivast av foreldrum/foreldramyndugleika og viðleggjast

umsóknini saman við váttan frá peningastovni á sama hátt sum hjá teimum, ið búgva til leigu (sí punkt 6)

### *3.3 Ferðastudningur innanoyggja*
Um tú ikki hevur søkt um ferðastudning umvegis www.innskriving.fo (miðnámsskúlanæmingar) tá tú søkti inn á útbúgvingina, skal søkjast á heimasíðuni www.ssl.fo. Trýst á "skúlakort" og útfyll umsóknarblaðið. Niðast á síðuni "skúlakort" er "Leiðbeining til næmingar".

Meginreglan í skipanini er, at øll lesandi, ið hava fyri neyðini at nýta Strandfaraskip Landsins, ferðast ókeypis aftur og fram í skúla í mesta lagi einaferð um dagin, uttan mun til fjarstøðu frá skúlanum. Møguleiki er eisini at ferðast til og frá starvsvenjingarstaði, um so er, at starvsvenjingartíðarskeiðið er samanhangandi og varir í minsta lagi 4 vikur.

Treytin fyri at fáa ferðastudningin er hin sama, ið er galdandi fyri at fáa lestrarstuðulin. Tó kunnu lesandi við Húsarhaldsskúla Føroya og útlendsk lesandi í Føroyum t.d. AFS-arar fáa ferðastudning.

### *3.4 Barnsburðarfarloyvisstudningur*
Barnsburðarfarloyvisstudningur verður veittur í sambandi við barnsburð og ættleiðing. Studningurin, sum er tann hægri studningurin, verður í mesta lagi veittur í 11 mánaðir fyri hvønn barnsburð. Tann lesandi skal búgva saman við barninum fyri at fáa farloyvisstudningin, og bæði foreldrini kunnu ikki samstundis fáa farloyvisstudningin.
Barnsburðarfarloyvisskipanin gevur báðum foreldrum somu rættindi. Bæði móðirin og faðirin ið lesa, kunnu fara í farloyvi, treytað av, at tey ikki eru í farloyvisskipanini samstundis. Við øðrum orðum fylgir farloyvisstudningurin barninum uttan mun til, um tað er móðirin ella faðirin, ið velur at fara í farloyvi. Foreldrini avgera sjálvi, hvussu tey býta farloyvið ímillum sín. Nágreiniligari er greitt frá mannagongd v.m. á baksíðuni á "Umsóknarblað til barnsburðarfarloyvi" og á heimasíðuni.
**Gev gætur:** Tá byrjað verður aftur í skúla eftir barnsburð, skal skjalið "Endalig fráboðan um barnsburðarfarloyvi" latast Studna.

Barnsburðarfarloyvisstudningur kann eisini veitast frá upp til 3 mánaðum eftir føðing. Ásetingin er gjørd fyri at fáa størri smidleika í barnsburðarfarloyvisskipanina. T.d. er tað av týdningi fyri lesandi, ið eigur barn um várið, at møguleiki er at bíða við at fara í barnsburðarfarloyvi til summarfríðtíðina uttan at missa ein part av barnsburðarfarloyvinum.
Gev gætur: at lesandi missa rættin til barnsburðarfarloyvisstudningin, um tað er gingið longri enn 3 mánaðir eftir føðing, áðrenn farloyvið byrjar.

### *3.5 Barnastudningurin*
Barnastudningurin verður veittur lesandi, ið hava forsyrgjaraskyldur av børnum, ið eru undir 18 ár. Bert tey, ið eiga ella hava ættleitt børnini, hava forsyrgjaraskyldur. Lesa báðir uppihaldararnir, kann bert annar søkja um barnastudningin. Barnastudningurin verður bert latin tí, ið býr saman við barninum sambært skrásetingini hjá Landsfólkayvirlitinum. Studni kann í serligum førum geva undantak frá bústaðarkravinum. Við barnsburð verður barnastudningurin fyrstu ferð veittur sama mánað, sum barnið er føtt.

### *3.6 Studningur til einsamallar uppihaldarar*
Studningur til einsamallar uppihaldarar verður veittur umsøkjara, ið er lestrarvirkin og fær serliga barnaískoyti til einsamallar uppihaldarar frá Almannaverkinum.

### *3.7 Inntøkujavningin*
Vanligi mánaðarligi studningurin verður inntøkujavnaður um mánaðarliga miðal útgoldna A-inntøkan fer upp um kr. 20.000. Fyri hvørjar kr. 1.000 mánaðarliga miðal útgoldna A-inntøkan er hægri enn kr. 20.000, lækkar studningurin við 10%. Ynskir tú fleiri upplýsingar um inntøkujavningina, les so meira um hetta á heimasíðu okkara undir tíðindum.

## 4. Stuðulstreytir
Fyri at fáa stuðul frá Studna skulu ymiskar treytir vera uppfyltar:

### *4.1 Góðkendar útbúgvingar*
Niðanfyrinevndu fulltíðarútbúgvingar í Føroyum, eru góðkendar sum stuðulsheimilaðar:
**Hægri útbúgvingar:** Útbúgvingar á Fróðskaparsetri Føroya, maskinmeistari, skipari, skipsførari, aspirantur, fíggjarbúskapur, teldustøðingur, maknaðarførslubúskapur, framleiðslutøkningur og byggitøkningur, byggifrøði, tænastubúskap og útbúgving í innovatión og íverksetan.
**Styttri vinnuførleikagevandi útbúgvingar:** Heilsuhjálpari, heilsurøktari, námsfrøðiligur hjálpari, maskinistur og skipsatstøðari.
**Miðnámsútbúgvingar:** Allar fulltíðar miðnámsútbúgvingar .
**Útbúgvingar á framhaldsdeildarstigi:** (bert fyri lesandi 18 ár og eldri): 8., 9. og 10. flokkur á

framhaldsdeildunum kring landið, á Dugna við Áir og á skúlanum á Trøðni.

### *4.2 Lestrarvirkni*
Lesandi er lestrarvirkin, um hann ikki er meira enn eitt ár afturúr í lesnaðinum í mun til ásettu lestrartíðina. Harafturat skal tann lesandi møta til frálæruna, lata inn kravdar uppgávur og fara til próvtøkurnar eftir teimum reglum, sum eru galdandi á útbúgvingarstovninum.
Útbúgvingarstovnurin váttar lestrarvirkni mótvegis Studna, leypandi.
Í mars og oktober verður lestrarvirkni eftirkannað, t.v.s. at mánaðrligi útgoldnið studningurin verður samanborin við staðin ECTS ella lestrarframburð. Harafturat verður eftirkannað, um tann lesandi møtir til frálæruna, letur inn kravdar uppgávur og fer til próvtøkurnar eftir teimum reglum, sum eru galdandi á útbúgvingarstaðnum.

**Gevið gætur: Um lesandi er meira enn 1 ár (60 ECTS) afturúr í lesnaðinum, verður lestrarstuðulin steðgaður og møguliga kravdur aftur beinanvegin. Um lesandi gerast lestrarvirkin aftur, t.v.s. eru minni enn 1 ár afturúr lesnaðinum í mun til lestrartíðina, verður lestrarstuðulin aftur útgoldin frá tí tíðarskeiði lesandi aftur gjørdist lestrarvirkin.**

### *4.3 Heiltíðarlestur*
Ein útbúgving er stuðulsheimilað, tá hon er skipað sum heiltíðarlestur, er minst 3 fylgjandi mánaðir til longdar, er ólønt og endar við próvtøku. Undantikin ásetingina um próvtøku eru næmingar á serligum skipaðum miðnámi (serbreytin).

Fyri at verða roknaður sum heiltíðarlesandi krevst, tá talan er um miðnámsútbúgvingar, styttri vinnuførleikagevandi útbúgvingar og útbúgvingar á framhaldsdeildarstigi fyri lesandi 18 ár og eldri, at tann lesandi hevur minst 20 lestrartímar um vikuna. Tó kunnu lesandi við heimabúgvandi børnum undir 10 ár og lesandi við serligum tørvi koma undir reglurnar um heiltíðarlestur, um tey lesa í minsta lagi 16 tímar um vikuna. Fyri hægri útbúgvingar verður farið eftir reglunum í 4.2, tá metast skal um heiltíðarlestur. Í ivamálum tekur Studni avgerð.

## 5. Stuðulstíð og -freistir
Stuðulsárið er frá 1. august til 30. juni árið eftir. Stuðulsárið er 11 mánaðir. Tó verður stuðul veittur teimum, ið lesa hægri lestur, einsamøllum uppihaldarum og aspirantum í 12 mánaðir í útbúgvingartíðini. Endar útbúgvingin í juni mánað, fæst tó ikki stuðul fyri juli.

Lestrarhálvurnar eru frá 1. august til 31. desember, og frá 1. januar til 30. juni. Stuðul fæst frá tí lestrarhálvuni, tá ið søkt verður, t.v.s. at umsóknarfreistin fyri eina útbúgving, ið byrjar í august mánað er 31. desember sama ár. Um søkt verður t.d. í mars mánaði árið eftir, fæst bert stuðul frá januar mánaði.

Møguligar broytingar í stuðulsviðurskiftum, skulu verða Studna í hendi innan 20. í hvørjum mánaði. Tó skulu broytingar í desember mánaði latast Studna innan 14. desember.

Studni flytir studning og lestrarlán á kontu í føroyskum peningastovni seinast í hvørjum mánaði.

Lesandi á miðnámsútbúgvingum, vinnuførleika-gevandi útbúgvingum ella á útbúgvingum á framhaldsdeildarstigi fáa í mesta lagi lestrarstuðul upp til eitt ár, eftir at ásetta lestrartíðin er lokin.

Lesandi á hægri útbúgvingum fáa í mesta lagi lestrarstuðul upp til eitt ár, eftir at ásetta lestrartíðin er lokin. Íroknaður er eisini stuðulin frá Statens Uddannelsesstøtte til útbúgvingar av sama slagi. Stuðul verður í mesta lagi latin í 6 ár til hægri útbúgvingar, íroknað stuðulin frá Statens Uddannelsesstøtte. Studni kann leingja stuðulstíðina við tveimum árum, um tann lesandi ikki hevur miðnámsútbúgving.

Studni kann gera undantak frá regluni um áramál, um lestrartíðin er vorðin longd vegna ráðsarbeiði, sjúku, barnsburð, ættleiðing, vísindaligt arbeiði o.a.

Um lesandi steðga á einari útbúgving og byrja aftur á somu útbúgving, er hetta at meta sum framhaldslestur, og telur tann higartil útgoldni stuðulin við, lesandi verða innskrivað til somu útbúgving av nýggjum. Hetta merkir, at lesandi kunnu verða ov langt afturúr lestrinum í seinnu innskrivingini, tá tey byrja ella stutt eftir at tey eru byrjað á útbúgvingini av nýggjum.

## 6. Lægri og hægri studningurin á miðnámi
Øll lesandi á hægri útbúgvingum ella styttri vinnuførleikagevandi útbúgvingum fáa kr. 4.960 í studningi um mánaðin.

Lesandi á miðnámi fáa hægra miðnámsstudningin kr. 4.387 um mánaðin, um tey uppfylla eina av fylgjandi treytum:
1. eru forsyrgjarar, t.v.s. gift ella foreldur,
2. kunnu skjalprógva egnan bústað,
3. kunnu skjalprógva leigu av bústaði.

Øll onnur fáa lægra miðnámsskúlastudningin kr. 2.113 um mánaðin.

Viðvíkjandi 1: Tey, ið eru forsyrgjarar, skulu einki gera, tí upplýsingarnir um barn/børn og gift v.m. verða heintaðir frá Landsfólkayvirlitinum.

Viðvíkjandi 2: Tey, ið eiga hús, skulu seta matrikul-nummarið á umsóknina og viðleggja skjalprógv.

Viðvíkjandi 3: Tey, ið leiga, skulu, um tey ikki uppfylla 1 ella 2, í hvørjum stuðulsári senda inn Studna-leiguváttanina, ið liggur á heimasíðuni.

Studni skal hava váttan, ið vísir, at húsaleigan verður goldin hvønn mánað framyvir, áðrenn hægri studningurin verður útgoldin. Øll, ið leiga, skulu flyta leiguupphæddina á kontu í peningastovni. Bert hesin gjaldsháttur verður góðkendur.

Eftir áheitan frá Studna, skulu tey, ið leiga, leggja húsaleigukvittanir ella kontuavrit fram fyri hvønn mánað í stuðulsárinum. Talan skal vera um flyting gjøgnum peningastovn, ið skal lúka hesi krøv:

a) at tað sæst á flytingini, at talan er um húsaleigu,
b) at tað sæst, hvør leigarin og útleigarin er,
c) at húsaleigan við el og hita fyri hvønn mánað í minsta lagi er kr. 1.200,
d) at flytingarnar eru dagførdar, t.v.s. at tær verða gjørdar mánaðarliga,
e) at tað sæst, hvønn mánað goldið er fyri.

Tað skal upplýsast, at húsaleiga er skattskyldug og skal inntøkuførast hjá útleigara, víst verður í hesum sambandi til leiguváttanina hjá Studna.

Tey, sum búgva á sama matrikkulnummari sum annað ella bæði foreldrini, fáa lægra studningin á miðnámi. Undantak kann gevast í serligum førum.

## 7. Broytingar

Lestrarstuðul fæst frá tí mánaðinum, ið útbúgvingin byrjar. Um ein, ið fær lægra studningin á miðnámi, verður foreldur, fær viðkomandi hægra studningin frá tí mánaðinum barnið er føtt. Barnastudningurin verður eisini útgoldin frá mánaðinum barnið er føtt.

Fyri allar aðrar broytingar er skeringspunktið mitt í mánaðinum, t.d. um lesandi gevst 1.–15. í mánaðinum, fær hann ikki stuðul fyri henda mánaðin. Gevst hann eftir 15. í mánaðinum fær hann stuðulin. Víst verður til fleiri dømi í § 9 í kunngerðini.

## 8. Lestrarlán og endalán

### *8.1 Lestrarlán og afturgjalding*

Lestrarlán renta við 2% p.a. í útbúgvingartíðini. Eftir lokna útbúgving verða lestrarlán rentað við 3% yvir diskontuni. Diskontan er í løtuni 3,35 % p.a. í juni 2024. Rentan eftir lokna útbúgving er sostatt 6,35%.

Tann lesandi byrjar vanliga at gjalda aftur lestrarlán og rentur eitt ár aftaná, at tað stuðulsárið er endað, har ið útbúgvingin er lokin ella steðgað. Útbúgvingin verður ikki søgd at verða lokin, um tann lesandi innan 15 mánaðir eftir hesa útbúgving, byrjar eina aðra útbúgving. Tað sama er galdandi, um ein fyribils steðgað útbúgving verður tikin upp aftur innan fyri somu tíðarfreist.

Afturgjaldsupphæddin verður ásett av Studna í mun til samlaðu skuldina. Afturgjaldstíðin er í mesta lagi 15 ár. Hvørt gjaldið skal í minsta lagi vera kr. 300 um mánaðin.

### *8.2 Endalán*

Lesandi, ið eftir vanligu reglunum hevur fingið tann stuðul sum kann fáast frá Studna, kann søkja um at fáa endalán, í mesta lagi í 11 mánaðir á kr. 7.742 um mánaðin. Treytin fyri at fáa endalán er, at tann lesandi tekur eina hægri útbúgving, er lestrarvirkin, og at avvarðandi lærustovnur kann vátta, at tann lesandi er førur fyri at gera útbúgvingina lidna innan 1 ár. Afturgjaldstreytirnar fyri hetta lán eru tær somu sum fyri vanliga lestrarlánið.

## 9. Upplýsingarskylda

### *9.1 Ábyrgdin hjá tí lesandi*

**Gev gætur:** Lesandi, sum fáa stuðul frá Studna, skulu beinanvegin boða Studna frá, tá ið tey:

1) gevast at lesa,
2) steðga ella verða liðug við útbúgvingina, um hetta ikki sæst í umsóknini,
3) steðga við eini útbúgving fyri at byrja upp á eina aðra útbúgving í sama stuðulsári,
4) broyta bústað,
5) fara í barnsburðarfarloyvi ella annað farloyvi,
6) ikki búgva saman við barninum longur,
7) ikki longur eru undir heiltíðarlestri
8) ikki longur eru lestrarvirkin, (sí pkt. 4.2)

Allar broytingar, sum annars hava ávirkan á stuðulin, skulu fráboðast Studna beinanvegin.

Ikki er neyðugt, at tann lesandi boðar frá, um útbúgvingarstovnurin ger tað. Tað er tó ábyrgd hjá

tí lesandi, at Studni fær fráboðanina. Stuðulin frá Studna verður altíð at rokna sum fyribils útgoldin.

**Gev gætur: Eru broytingar í stuðuls-viðurskiftunum hjá tí einstaka, ið gera, at tann lesandi hevur fingið ov nógvan stuðul útgoldnan, verður tann ov nógv útgoldna upphæddin kravd inn aftur beinanvegin. Tað er ábyrgdin hjá tí lesandi, at Studni fær fráboðanina. Tað er tí umráðandi, at Studni skjótast til ber fær upplýsingar um møguligar broytingar.**

### *9.2 Ábyrgdin hjá útbúgvingarstovninum*

Í sambandi við umsitingina av lestrarstuðlinum, skulu útbúgvingarstovnarnir:

1) Vátta, at tann lesandi gongur á eini stuðulsheimilaðari útbúgving
2) Veita vegleiðing í sambandi við lestrarstuðulin og útfyllan av umsóknarbløðum um lestrarstuðul.
3) Vátta, at útbúgvingartíðarskeiðið, søkt verður um, er rætt útfylt.
4) Veita vegleiðing í sambandi við ferðastudningin innanoyggja.
5) Beinanvegin at boða Studna frá, tá ið lesandi gevast við lestrinum ella ikki eru lestrarvirkin
6) Vera millumliður millum Studna og tann lesandi í ymiskum spurningum, ið stinga seg upp
7) Boða Studna frá viðurskiftum hjá lesandi, ið hava ávirkan á lestrarstuðulin.

### *9.3 Kærunevndin hjá Studna*

Allar avgerðir tiknar av Studna, kunnu kærast til Føroya Kærustovn, áðrenn 6 vikur eru gingnar, eftir at boðað er frá avgerðini. Avgerð Kærustovnsins er endalig innan fyrisitingina.
Møguligar kærur skulu sendast til:

Føroya Kærustovnur
Undir Hornabakka
Postsmoga 45
FO - 110 Tórshavn

*Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í hesi útgávu.*

Studni